# Talgildar rokningar

### Lógarskylda

Síðan 2018 hevur verið lógarkrav um, at veitarar senda landinum talgildar rokningar, og undirskilt er tað eisini ein skylda hjá almenna stovninum at tryggja, at lógarkravið verður fylgt.

Víst verður til *Løgtingslóg nr. 56 frá 10. mai 2017 um talgildar rokningar* og *Kunngerð nr. 130 frá 21. august 2017 um talgildar rokningar*.

Tað áliggur stovni at senda rokningar, sum koma við teldubrævi ella vanligum posti, aftur til veitaran við boðum um, at senda talgildar rokningar.

Tað er ikki í lagi at nýta funkuna innanhýsis skjal sum frávik frá lógarkravinum um, at veitarar skulu senda landinum talgildar rokningar.

### Talgild rokning - hvat er tað?

Talgild rokning er ein OIOUBL rokning (fyrr: OIOXML), har rokningin er "dátuberandi". OIO stendur fyri "Offentlig Information Online", sum er ein danskur standardur fyri talgildar rokningar, sum er grundaður á altjóða standardin UBL, ið stendur fyri "Universal Business Language".

Pdf rokning við teldupósti er ikki ein talgild rokning.

Í Leiðslukunningarskipanini síggjast talgildar rokningar sum grá ikonir og pdf rokningar sum blá ikonir undir "Skjal".

### Fyrimunir við talgildum rokningum

Munur er á viðgerðini av talgildum rokningum og pdf rokningum. Talgildar rokningar verða sendar "frá skipan til skipan" uttan um nakran persón, so rokningin endar í Rokningaverkgongd (RVG) skjótast gjørligt. Hinvegin verður ein pdf rokning fyrst send við teldupósti til ávísan stovn, har starvsfólk viðger rokningina og síðan sendir hana víðari til Gjaldstovuna, har bókhaldari viðger og skannar rokningina, áðrenn rokningin endar í RVG.

Tískil eru fleiri fyrimunir fyri veitaran at senda talgilt, tí talgild rokning endar skjótari í RVG enn pdf rokning, og tískil gongur styttri tíð, áðrenn rokningin er endaliga avgreidd. Annar fyrimunur er, at rokningin altíð verður innlisin við teimum upplýsingum, sum veitarin veitir.

Fyrimunur hjá landinum við talgildum rokningum er serliga, at landið sparir nógva arbeiðsorku, tí minni arbeiðsorka skal brúkast upp á at viðgera og skanna rokningar. Annar fyrimunur er, at stovnar kunnu fáa meira nyttu úr upplýsingunum í vørulinjunum.

**At senda talgildar rokningar**

Tað eru tveir mátar hjá veitarum at senda talgilda rokning til almennar stovnar uppá:

- Umvegis GLN nummar
- Umvegis rokningaportal

*Umvegis GLN nummar*

At senda rokningar við GLN numrum (fyrr: EAN nummar) krevur, at veitarin brúkar roknskaparskipan við hesum møguleika. Allir almennir stovnar hava sítt egna GLN nummar, sum sæst á lista á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni, og veitarin skrivar GLN nummarið hjá stovninum í upplýsingar um kundan. Vanliga verður veitarin noyddur til at gera avtalu við antin Elektron ella FarPay fyri at kunna senda talgildar rokningar við GLN numrum. Summar bókhaldsskipanir á netinum hava ofta ein sendara til talgildar rokningar innbygdan. Dømi um slíkar skipanir eru e-conomic, Dinero og Admind.

*Umvegis rokningaportal*

Veitari kann senda talgilda rokning umvegis ein rokningaportal t.d. tann á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni, sum er ókeypis hjá veitarum at brúka. Sí leinkið: https://rokning.gjaldstovan.fo/invoice/create. Í rokningaportalinum skrivar veitarin neyðugu rokningarupplýsingarnar og hevur eisini møguleika at viðhefta pdf skjøl.

Fyri at brúka rokningaportalin á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni eru krøvini til veitaran, at hann hevur v-tal, og at hann er føroyskur (tí veitarin skal vátta rokningina við einum føroyskum +298-telefonnummari).

Til ber eisini hjá eitt nú donskum veitarum at brúka aðrar rokningaportalar eitt nú tann hjá Sproom.